## DAGSINS MEINING

# Óskil

Leysir hundar hava altíð verið til ampa og beinleiðis til skaða fyri fólk og fæ í hesum landi. Her er talan um ein sera gamlan trupulleika, ja, so gamlan, at man longu í miðøldini kendi seg noyddan at lóggeva móti hundaóskilinum. Tí var tað tiltikna Hundabrævið samtykt á Føroya Løgtingi einaferð í myrkari Miðøld. Leysir hundar eru ein sonn plága í høvuðsstaðnum og víða hvar um landið. Tað sigst vera býlingar, har foreldur til tíðir illa nokk tora at lata børnini spæla úti, so illa verða tey plágað av leysum hundum. Kortini tykist tað sum avvarðandi myndugleikar hvørki vilja ella megna at gera nakað við hundaóskilið.

Nú hendi so ein álvarsom vanlukka í Suðuroy, har ein smádrongur varð skambitin av leysum hundi. Hendingin er ein skelkur fyri drongin og fyri øll foreldur. Slíkt skal als ikki kunna koma fyri. Allir hundar skulu vera í bandi. Fólk kæra seg ofta um leysar hundar, men einki verður gjørt við óskilið. Seinastu árini er eisini hent tað, at talið av hundum er økt heilt nógv. At eiga hund av góðum útlendskum slag er vorðið ein mótasøk. Hundar verða innfluttir í hópatali og eftirlitið við, um talan er um friðardýr ella bithundar man vera sum Harragud veit. Støðan er í hvussu so er tann, at nógv foreldur kenna seg ótrygg. Henda støða kann ikki halda fram. Her má okkurt gerast.

Myndugleikarnir eiga at skerpa reglurnar fyri hundahaldi, eftirlitið við innflutningi av hundum eigur somuleiðis at verða nógv skerpt, og eigarar eiga at ábyrgdast fyri teir skaðar, sum hundar teirra elva til. Allir hundar eiga at vera í bandi uttan mun til, um eigarin er til gongu úti ella hundur hevur tilhald við hús eigarans. Tað, sum hendi í Sumba herfyri, har smádrongur varð álopin, eigur ikki at kunna henda aftur í Føroyum. Børn eru verjuleys í so mongum høpi í dagsins samfelag. Tað er skylda myndugleikana at gera alt, sum gerast kann til tess at verja børn móti teimum vandum, sum støðugt hótta tey, uttan mun til hvørjir hesir vandar so enn eru.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ískoytið til orðaskiftið í fjølmiðlunum um prísir á innfluttum landbúnaðarvørum í kapping við okkara heimamarknað

**Bjørn Patursson**
*Formaður í Bóndafelag Føroya*



Vit tosa øll um fríða vinnu og fríðan flutning. Men tá møguleikin brádliga er har vísur tað seg ofta at vinnurekandi møta alskyns forðingum, soleiðis var eisini nú vit høvdu havt ein tjans at útflyta seyðakjøt til kræsnar gómar í Keypmannahavn.

Kapping er góð!, og vit sum starvast í landbúnaðinum eru ikki bangin fyri kapping, bert hon er á líkaføti. Men kappingin er vónleys tá kappingarneytin í útgangstøði er fær fyrimunir sum vit sum kappingarneytar onga ávirkan hava á.

Á summum økjum eru kappingarneytar okkara frammanfyri tí teir hava náttúrligar fyrimunir og stórdriftsfyrimunir, tað fáa vit einki gjørt við, og tað er ikki tað ringasta. Tað ringasta er tá kappingarneytarnir avtrat hesum náttúrugivnu fyrimunum fáa stórar fíggjarligar fyrimunir við studningum fleirfaldað tað sum okkara vinna fær og ótarnað fáa loyvi at dumpa yvirskotsframleiðslur inn á okkara marknað. Í slíkum førum ber ikki til at kappast og úrslitið er at tað sum vit hóðast alt kundu framleitt sjálvir keypa vit frá øðrum so leingi naka er at fáa. Vit gerðast minni og minni sjálvbjargnir meðan vit eru við til at menna vinnulívið í grannalondum okkara.

Fyri at lýsa støðuna á ein einfalda hátt kunnu vit siga at, tá ein bóndi í Føroyum fær eina krónu útgoldið í stuðuli fær ein íslendskur bóndi fær áleið 14 krónur, ein norskur bóndi 12 krónur og ein danskur-ES bóndi 8 krónur.

Hesi lond leggja stóran dent á at verða sjálvbjargin við matvørum. Orsøkin er oftast tí tey eru bangin fyri at koma í støðu har forboð ella annað avskerð tey frá at flyta matvørur inn í landið, til dømis umfarsjúkur, handilskríggj o.tl. Mat skulu vit øll altíð hava.

Eitt ítøkiligt dømið um innanhýsis stuðul er hendan kjøtavrokningin til ein svenskan-ES bónda:

**Kjøtavrokning hjá einum svenskum bónda í 2002**

| | |
|---|---|
| **Slaktiavrokning** | |
| 300 kg. (kr/kg 20,30) | kr. 6.090 |
| Slaktistuðul | kr. 800 |
| Oksastuðul | kr. 2.820 |
| Ekstensivstuðul | kr. 1.900 |
| LAF Økisstuðul | kr. 1.750 |
| Miljøstuðul | kr. 1.947 |
| Stuðul fyri vistfrøðiliga framleiðslu | kr. 1.350 |
| Stuðul íalt | kr. 10.567 |
| Avrokning fyri oksan íalt (kr/kg 55,52) | kr. 16.657 |

*Kelda Norsk Landbrug 10/2002*

Avrokningin talar fyri seg, emn eftir hesum sæst at kjøtprísurin er 36%, meðan stuðulin er 64% av avrokningini. Samlaði avrokningarprísurin til bóndan fyri hetta slaktið er kr. 55,52, men um sláturvirkið útflutti kjøtið til eitt nú Føroyar ja so sær tað út sum at svensku bóndurnir eru sera dúgligir at framleiða bíligt kjøt.

Eitt annað dømið er seyðakjøt úr Íslandi. Avrokningarprísur til bónda fyri kilo seyðakjøt er áleið kr. 31. Av trat hesum fær bóndin áleið kr. 490 fyri hvørt "ærgildið". Til tess at samanhalda hetta við okkara viðurskifti havi eg flutt skipanina til føroysk viðurskiftir og tá fær bóndin áleið kr. 58 fyri kilo pluss tillegg um hann flettur fyrr og seinni enn vanligt er.

Íslendingar hava havt trupulleikar við ov stórari seyðakjøtframleiðslu, men av ymiskum orsøkum, eitt nú skipan um niðurberjing av ridluskriða hevur hendan yvirskotsframleiðsla verið minkandi. Bóndurnir hava tíðskil fingið tillutaðar kvotur á seyðakjøti. Tað er tó torført at raka beint á kvotuna og tí hevur tað sum hevur verið omanfyri ásettu kvotuna farið til útflutnings, m.a. til Føroyar. Fyri hetta hevur bóndin fingið avrokna tað sum hesin marknaður hevur vilja latið fyri kjøtið.

Tað er ikki tann stóri kunsturin at rokna hvat ein íslendskur bóndi fær fyri kilo tá kjøtið verður selt við handilsdiskin í Føroyum fyri kr. 39,90. Sum skipanin er við "ærgildinum" fær eisini tann íslendski bóndin stuðul fyri tað sum ferð til útflutnings.

Eftir hesum skipanum er tað húskini í londunum vit handla við sum, at enda gjalda fyri at vit í Føroyum kunnu keypa bíligar matvørur á borðið.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Meðan smíðað verður

**Hergeir Nielsen**



Samstundis sum vit sita og gera avtalur við tað suverena yvirvaldið um yvirtøkur og samstundis sum vit sita og smíða egna grundlóg, fáa vit ein lúsingin fyri og annan eftir.

Serliga er tað løgtingið, ið leggur rygg til, og serliga eru tað viðtøkurnar hjá einum samdum løgtingi, ið verða ryggbrotnar.

Løgtingsformaðurin, sum skal tryggja okkum lóg og landaskil, fær av at vita, og løgmaður, sum skal umsita og fremja hansara vilja, fær av somu skuffu.

Fyrrárið samtykti løgtingið eitt ríkislógartilmæli um avtøku av nøkrum hernaðarligum revsi- og rættargangslógum og løgmaður staðfesti og fráboðaði ríkismyndugleikunum hesa viðtøku.

Men ríkismyndugleikarnir hirdu hesum ikki aftursvar, og lótu vera við at seta tað í gildi, sum løgtingið hevði samtykt.

Í mai mánaða í ár royndi fólkavalda løgting okkara seg á øðrum sinni og samtykti at avtaka nakrar hernaðarligar revsi- og rættargangs- og heimarættarlógir v.m. sum trýstar vóru niður yvir okkum, men við sama úrsliti.

Ríkismyndugleikarnir lótu sum luft, hirdu hesum ikki aftursvar, og lótu bara vera við at seta nakað í gildið, sum ikki hóvaði teimum.

Løgtingið hevur soleiðis í tveimum feskum umførum fingið at vita, hvør ið ræður í hesum landi og ríki.

Eina triðju ferðina fór løgtingið aftur út á víðan vøll at stríðast fyri javnbjóðis rættindum við grannalondini, og enn eina ferðina fekk tað ein beint frammaná, og liggur nú løgtingsins vilji barlangur eftiri á vali.

Í vár samtykti løgtingið, at Føroyar skuldu søkja um fullgildugan limaskap í Norðurlandaráðnum, og skuldu gerast sjálvstøðugur avtalupartur í felags norðurlendskum sáttmálum, og at landsstýrið skuldi taka øll neyðug stig í hesum sambandi.

Hetta gongur heldur ikki, siga danir. Nú hevur løgtingið gjørt seg inn á danskan yvirvaldsrætt, ja Føroya Løgting hevur gjørt seg inn á sjálva grundlógina, siga teir í Holmens Kanal.

Málið varð annars varð væl og virðiliga lýst, og eitt samt løgting atkvøddi fyri og samtykti tað.

Undan framløguni hevði málið fingið vanliga viðgerð, varð fyrireikað av løgmálaráðnum og framlagt av landsstýrismanninum í lógarmálum.

Upplýst varð í málinum, at landsstýrið hevði kannað, hvat í høvuðsheitum kravdist løgfrøðiliga, fíggjarliga og umsitingarliga til tess at hava fullgildugan limaskap í Norðurlandaráðnum, og svarað varð, at hetta kravdi broytingar í Helsinki-avtaluni, so Føroyar verða sjálvstøðugur, fólkarættarliga avtalupartur.

Samsvarandi hesi løgfrøðiligu niðurstøðu mælti landsstýrismaðurin í lógarmálum løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Málið varð eins og onnur mál borið løgtingsskrivstovuni til fyrireikingar.

Eftir § 57 í tingskipanini skal løgtingsformaðurin mæla løgtinginum til at vísa burtur uppskot, sum ganga ímóti grundlóg ríkisins, heimastýrislógini, stýrisskipanarlógini, tingskipanini ella millumtjóða sáttmála.

Løgtingsformaðurin burturvísti ikki hesum máli sum verandi í stríð við oman fyri nevndu galdandi lóggávu og hevur tvørturímóti sum evsti fyrisitari løgtingsins góðkent allar vanligar mannagongdir innan føroyskt lóggávusmíð í hesum máli.

Lokala umboð forsætismálaráðharrans á tingi, ríkisumboðið, nýtti ikki høvið eftir § 15, stk. 2 í heimastýrislógini at føra fram nøkur sjónarmið, ið ávaraðu løgtingið ímóti at gera seg inn á danskan lóggávurætt.

Føroya Løgting hevur síðani í góðari trúgv samtykt hetta mál, og løgmaður hevur í minst líka so góðari trúgv lýst málið sum galdandi rætt.

Hóast føroyskt lógarsmíð er farið fram á regluligan hátt fáa vit málið aftur í høvdið vísandi til, at løgtingssamtyktin er í stríð við grundlógina.

Ongastaðni undir allari málsviðgerðini sæst heimastýrið hava ansað eftir, at hesi mál eru í stríð við danska rættarskipan ella sjálva grundlógina, og spurt verður tí, um lógarførleiki okkara er nóg neyvur, ella um talan er um rættarligan ágang frá danskari síðu.

Hesi dømi av fleiri benda á, at talan er um sera álvarsliga afturgongd í ríkisrættarligu viðurskiftum okkara, har sjálv rættartrygdin innan ríkisrættin tykist vera fokin.

Niðurstøðan hjá danska forsætismálaráðharranum er jú, at føroyska heimastýrið undir evstu ábyrgd av løgtingsformanni og løgmanni hevur gjørt seg inn á grundlógartryggjaði rættindini hjá danska statinum yvir Føroyum.

Vit royna av øllum alvi at leita okkum nýggjar vinnu- og samstarvsmøguleikar við hini Norðanlondini, men fáa at vita frá ES-landinum Danmark, at víðari føroyskt samstarv við hini norðanlondini rennur seg ímóti donsku grundlógini.

Orsøk er tá at spyrja, um føroyska lógarverkið er nóg væl at sær komið, ella um vit fara at taka til takkar við, at danska grundlógin, sum føroyingar ongantíð hava samtykt, veruliga fer at forða okkum í fullgildigum samstarvi við hini Norðanlondini.

Tá sama grundlóg so samstundis loyvir Danmørkini at binda seg endaliga at ES-grundlógini, ja so er greitt, at føroyingar eiga at skunda sær enn meira við at tryggja sær egnu áhugamál síni undir egnari grundlóg.

# Sambandsflokkar

**Hans J. Hermansen**



Nú sær út til, at talið av sambandsflokkum í Føroyum er farið at økjast. Øllum hevur verið greitt, at bæði Sambandsflokkurin og Javnaðarflokkurin fegnir vilja kenna fløvan undan afturpartinum av okkara drotning. Størsta hending, tá ið stóru flokkarnir halda ársfund, er at fáa eitt útlendskt orakul at undirhalda. Tá smílast tey upp um bæði oyru.

Men at Tjóðveldisflokkurin - sum sigur seg stríðast fyri tjóðveldi, fullveldi ella sjálvstýri, alt eftir hvat hóskar teimum best - leggur seg skerflatan fyri íslendingum, er bara tekin um ómegd: Sjálvir megna vit einki á tjóðveldis-, fullveldis- ella sjálvstýrisleið, tykist hann at hava viðurkent.

Og tað man hava verið íslendingum ein stórur heiður at hava fingið ein av okkara bestu "stand-up comedians" at halda røðu og bera fram heilsu frá okkum føroyingum.

Vit føroyingar bíða bara eftir einari framtíð við sjálvstýri við leiðarum, ið eru førir fyri at taka tær skilabestu avgerðirnar fyri okkum, ið her búgva, við íblástri úr okkara egnu mentan. Tí sjálvstýrið kemur, og vit kunnu fáa gott sjálvstýri, um vit hava tol at bíða. Best er at duga at svimja, tá ið tú leypur á bláman — og tá er stuttligt at leypa útí.

Orð eru óneyðug, um vit leypa á bláman fyri síðan at biðja um hjálp, tí svimjikynstrið er so sum so.

Kanska sær framtíð føroyinga bjartari út, um lív kemur aftur í Risan og Kellingina. Bert lúsin útlendsk er.

# VÍF – Fútaliðið?

**E. K. Nielsen**
*Rituvík*

Tað hevur altíð verið lítið virt í Føroyum, at sleppa øðrum upp í øvrigheitshendur«.

VÍF hevur nú tikið hendan táttin upp, innan ítróttina í Føroyum.

Eg havi bert tað at viðmerkja. Hatta var ein mannminkandi og sera sera sera lúsut meny tit har borðreiddu við.

Væl kundi hent, at hasin boomurangur, rakti tykkum sjálvar aftur í afturpartin.

Smettarin hevur aldrig verið vælsæddur av pøblinum.

Annars, alt tað besta í framtíðini.

# Ørandi vakurleiki og ræðuleiki

**Turið Sigurðardóttir heldur í kvøld, 19. nov., fyrilestur um Evu Ström**

TÍÐINDASKRIV
*Norrøna Felagið*

Eva Ström (f. 1947), sum vann bókmentavirðisløn Norðurlandaráðsins í ár fyri yrkingasavnið Revbensstäderna, er ein málliistmaður, sum skapar myndir av ørandi vakurleika og ræðuleika.

Yrkingarnar í virðisløntu bókini spretta úr samtíðar-veruleikanum, ikki minst sum vit kenna hann úr fjølmiðlunum, men eisini alment menniskjansligum royndum. Harumframt er bakgrundin millum annað stóra vitan skaldsins um bæði heimbókmentir og nútímans læknavísindi.

Í kvøld kl. 19.30 heldur Turið Sigurðardóttir almennan fyrilestur um Evu Ström í Norðurlandahúsinum. Norrøna Felagið í Føroyum skipar fyri.

Tá Eva Ström fekk bókmentavirðislønina á ársfundinum hjá Norðurlandaráðnum í Oslo síðst í oktober, las Turið Sigurðardóttir grundgevingina hjá dómsnevndini.

Eva Ström gav út fyrsta yrkingasavnið hjá sær Den brinnande zeppelinaren í 1977, og Revbensstäderna er sætta yrkingasavnið hjá henni. Frá 1977 til 1988 arbeiddi hon sum lækni, men nú er hon rithøvundur burturav. Hon skrivar eisini skaldsøgur og sjónleikir, og hon ummælir bókmentir.

# Tíðindi úr Bókadeild KFUMs

Í bókabúðirnar er komið søgusavnið Lyftini halda eftir Adrian Johansen. Theodor Hansen hevur savnað og týtt.

Adrian er føddur og uppvaksin á Strondum. Adrian var trúboði hjá Heimamissiónini í Danmørk meginpartin av lívi sínum. Umframt søgusøvn, ritroyndarsøvn og barnabøkur hevur Adrian skrivað trettan skaldsøgur. Evnið í seks av skaldsøgum hansara er úr Føroyum. Adrian legði sær ta uppgávu at hjarta, at hann eisini skuldi bera gleðiboðskapin um Jesus Krist út í hinum skrivaða orðinum.

Í søgusavninum Lyftini halda eru 23 stuttsøgur. Fleiri bera ein jólaligan dám og onkur eitt sindur skemtilig.

Permumynd Absalon Hansen. Tekningar Janus Guttesen. Perma og uppseting Ívar Dam. Prentað og heft p/f Einars Prent.

Bókin Lyftini halda er 207 blaðsíður og kostar kr. 198,

Bókadeild KFUMs í Tórshavn hevur givið út.